# Tilvildin má ikki ráða

*Galdandi skipan ikki nøktandi, sigur Kristian Magnussen, sum vegna Javnaðarflokkin hevur lagt uppskot fram um viðbót til pensjónistar*



*Kristian Magnussen mælir til, at pensjónistar fáa meira pengar*

ÓLAVUR Í BEITI

Í farnu viku legði Kristian Magnussen vegna Javnaðarflokkurin uppskot fram, tí mett verður, at neyðugt er at gera ymsar broytingar í lógini um viðbót til ávísar pensjónistar.

Í viðmerkingunum til uppskotið, sigur Kristian Magnussen, at lógin var upprunaliga ætlað sum ein viðbót til teir pensjónistar, ið lítið og einki annað hava enn pensjónina at liva av. Hetta er enn endamálið. Lógin ásetir, at ávís upphædd, ið verður ásett í kunngerð, verður útgoldin 3 ferðir um árið. Upprunaliga var upphæddin ætlað sum stuðul til útreiðslur av brenniolju og seinni eisini til útreiðslur til útvarps- og sjónvarpsgjald.

– Seinastu 2 árini er upphæddin á fíggjarlógini ikki hækkað, hóast útreiðslurnar til olju og sjónvarps- og útvarpsgjald eru hækkaðar. Útvarps- og sjónvarpsgjøldini eru hækkað kr. 115,- í ár, og oljuprísurin er hækkaður munandi síðan t.d. somu tíð í fjør.

**Ikki nøktandi**

Og víðari sigur Kristian Magnussen, at galdandi skipan at upphæddin verður ásett í kunngerð, er ikki nøktandi, tá upphæddin á fíggjarlógini ikki verður dagførd samsvarandi øktu útreiðslunum, ið viðbótin er ætlað sum endurgjald fyri.

– Verður lógin ikki broytt, og/ella hægri játtan sett á fíggjarlógina, so verða avleiðingarnar, at upphæddin til hvønn einstakan gerst minni, tí tað gerast fleiri pensjónistar, ið eru fevndir av lógini. Við øðrum orðum skulu fleiri til at býta eina upphædd, ið hvørki verður javnað ella hækkað.

– Javnaðarflokkurin metir ikki, at vit framhaldandi kunnu lata tilvildina ráða í hesum máli, og skjýtur tí upp, at viðbótin verður sett inn í lógina, og at upphæddin verður hækkað soleiðis, at hon samanlagt verður kr. 5.100,- fyri inniverandi ár. Hetta er ein hækking uppá kr. 1.713,- til hvønn av teimum 3.829 pensjónistunum, ið væntandi verða fevndir av lógini í ár.

Og mett verður, at kostnaðurin av hækkingini verður 6,559 mió. kr. í ár 2000. Henda upphædd verður at seta á fíggjarløgtingslógina fyri ár 2000, sigur Kristian Magnussen.



*Býráðið í Fuglafirði til arbeiðis. Frá vinstru sæst Sigurð S. Simonsen, Sigfríður Vørðhamar og aftanfyri hann situr Martin Simonsen, Jákup Frantz Larsen, býráðsskrivari, Hallbjørg Hansen, býráðsformaður, Dánjal Vang, næstformaður, Torfríður Abrahamsen, John Heri Joensen og Símun Abrahamsen.*

# Skúli, læknamiðstøð og havnaøki

*Fuglafjarðar Býráð avgjørdi á fundi týskvøldið at fara undir útbyggingina av skúlanum og at fara undir at gera nýggj læknahølir alt fyri eitt. Harafturímóti var ikki tikin endalig støða til kommunuskuldina*

SVEINUR TRÓNDARSON

Fuglafjarðar Býráð hevði fund túskvøldið og ikki færri enn 12 mál vóru á skránni.

Flestu teirra høvdu við havnaøkið at gera, men onnur stórmál, eitt nú um skúlan og um nýggj læknahøli vóru eisini avgreidd.

**Skúlin og læknahølini**

Nógvu málini um havnaøkið og Havsbrún góvu greiðar ábendingar um, at tað nógva virksemið á Havsbrún er nakað, sum gevur nógv av sær til kommunukassan, og at kommunan hevur eitt gott samstarv við stóra ídnaðarvirkið.

Á fundinum kom eisini fram, at íløgumarkið, sum er ásett av fíggjarmálastýrinum ikki er fallið í góða jørð í Fuglafirði, tí fleiri av neyðugu íløgunum í býnum eru settar á bíðilista, meðan aðrar verða gjørdar yvir raksturin ístaðin.

Býráðið hevur kortini staðfest, at tað ikki nyttar at ganga ímóti rætningslinjunum, sum Fíggjarmálastýrið hevur sett, og hevur tí valt at fylgja teimum.

Skúlaútbyggingin var sum nevnt á skránni og býráðið samtykti, at fara undir at útbyggja skúlan. Aðrastaðni á síðuni er greitt meira nágreiniliga frá viðgerðini av tí málinum.

Tað sama er galdandi viðvíkjandi nýggju læknahølunum, sum býráðið eisini samtykti at fara undir eftir nakað av or-adrátti millum andstøðu og samgongu.

Júst hetta mál er nær tengt at íløguloftinum, sum Fuglafjarðar Kommuna hevur fingið, tí nýggja læknamiðstøðin var á íløguskránni fyri veradi fíggjarár.

**Kommunuskuldin**

Eins og hinar kommunurnar í landinum er Fuglafjarðar kommuna tyngd av skuld um enn tað ikki er av tí ringasta.

Uppskotið um felagsloysn av kommunuskuldini var eisini viðgjørt á fundinum týskvøldið, men av tí, at nýggjar upplýsingar eru komnar frá løgmanni í tí málinum, valdi býráðið at senda tað málið aftur í fíggjarnevndina.

Kortini fekst ein greið mynd av, at býráðið sum støðan er nú, ikki er sinnað at taka undir við eini felags loysn.

Serliga tað, at Tórshavnar Kommuna hevur valt ikki at vera við, hevur sína ávirkan á støðuna hjá kommununi, men eisini vitanin um, at aðrar kommunur, sum eru í líknandi støðu, sum Fuglafjarðar Kommuna er, hava fingið ábendingar um eina rímuliga fígging, hevur ávirkan á støðuna hjá býráðnum.

Sum sagt, er eingin støða tikin til hetta málið enn, og eftir tí, sum vit hava frætt, kemur tað fyri á býráðsfundi aftur í marts mánaði.

# Eivør og Hjarnar til grýludans



Árligi grýludansurin verður í ítróttarhøllini á Kambsdali í kvøld.

Høvuðsnavnið á kvøldinum er Hjarnar, sum hava spælt til hendan dansin hvørja ferð, hann hevur verið seinastu nýggju árini.

Saman við Hjarnar fer eisini Eivør Pálsdóttir at syngja og spæla.

Harafturat verður ymiskt annað á skránni. Mótashow við undirklæðum, Dirty Dancing, føroyskir Chippendales og rock‘n‘roll dansishow.

Fólk hava høvi at fara í grýluklæði, tí best klædda grýlan vinnur eina uttanlandsferð fyri tvey. Nummar tvey og trý fáa eisini virðislønn.

Tað er Kom og Dansa, sum skipar fyri.

**ek**






TÚ SKALT VERA VAKSIN, MEN EISINI BARN

## DAGRØKTARAR TIL TÓRSHAVNAR KOMMUNU

**Sum dagrøktari í Tórshavnar kommunu fært tú eitt sera sjálvstøðugt og fjølbroytt starv. Starvið er væl lønt og krevur ein professionellan hugburð til barnauppaling. Frá kommununi fært tú fakligan stuðul, skeið, ráðgeving frá økispedagogum, atgongd til spælistovur, fimleikahallir, svimjihyl og bókasavn.**

**AT VERA DAGRØKTARI**

Er eitt væl lønt starv, ið krevur ein professionellan hugburð til barnauppaling.
- Tú skalt geva børnunum umsorgan og tryggleika í heimligum umhvørvi.
- Tú skalt menna tey á øllum økjum.
- Tú skalt læra tey at gerast sjálvstøðug.

**FØRLEIKAR**

Krøvini til dagrøktarar eru m.a.:
- Tú skalt møta barninum á tess støði
- Tú skalt vera vaksin, men eisini barn
- Tú skalt vera góð/ur við børnini
- Tú skalt hava góð samstarvsevni
- Tú skalt vera skapandi og duga at finna uppá
- Tú skalt vera sjálvstøðug og sjálv leggja dagin til rættis

Fyri at kunna hava børn í dagrøkt er tað neyðugt, at hølini, har børnini verða ansað, eru egnað, og at møguleikar eru til uttandura virksemi.

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA BJÓÐAR:**

Sum dagrøktari í Tórshavnar kommunu fært tú eitt sera sjálvstøðugt og fjølbroytt starv og hollan stuðul frá kommunalu skipanini.

**TÚ FÆRT:**
- fakligan stuðul og ráðgeving frá økispedagogum
- grundskeið ætlað dagrøktarum
- samstarvsbólkar, har dagrøktarar hittast
- atgongd til spælistovur, fimleikahallir, svimjihyl og bókasavn

**LØNARVIÐURSKIFTI**

Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála við Tórshavnar Kommunala Starvs- og Tænastumannafelag. Í løtuni er lønin um dagin fyri hvørt barnið undir 3 ár kr. 160,29 , og barnið yvir 3 ár kr. 128,23. Ein triðingur av lønini verður roknaður sum útreiðslur í sambandi við dagrøktina, og er tí skattafríur.

**FYRISPURNINGAR OG UMSÓKNIR**

Hevur tú spurningar ella ert í iva um eitthvørt viðvíkjandi starvinum, ert tú vælkomin at ringja til okkara á tlf. 31 51 60 lokal 223. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu sendast til:

Tórshavnar kommuna
Dagrøktarskrivstovan
Brynhild Mohr Joensen, leiðara
Kirkjuvegur 1
100 Tórshavn

stephanssons hús tlf. 314291